## Olsen millum teir bestu

Heimasíðan, soccernet, hevur sett nøvn á teir 11 venjararnar, sum tey halda eru teir bestu í HM, sum verður spælt í Suðurafrika í summar. Danski Morten Olsen fær góð skoðsmál á síðuni, og er hann millum teir 11 kosnu. Hinir venjararnir á listanum eru Milovan Rajevac (Ghana), Carlos Dunga (Brasil), Joachim Low (Týskland), Ottmar Hitzfeld (Sveis), Marcello Lippi (Italia), Vicente del Bosque (Spania), Marcelo Bielsa (Chile), Radomir Antic (Serbia), Otto Rehhagel (Grikkaland) og Fabio Capello (Ongland)



## Vil spara Torres

Spanski landsliðsvenjarin, Vicente del Bosque, vil hava landsmann sín, Rafael Benitez, at brúka Fernando Torres minst møguligt komandi mánaðirnar. Torres dregist í løtuni við ein knæskaða, og skaðar hava argað somikið nógv, at hann bert hevur byrjað 14 dystir hetta kappingarárið. – Jú færri dystir hann spælir seinasta partin av kappingarárinum, tess betri er tað fyri okkum. Vit vilja hava hann so frískan, sum tað á nakran hátt ber til, sigur del Bosque.



Fyri steðgin var Simona Petersen einasti av spælarunum hjá Stjørnuni, sum megnaði at bróta væl stríðandi verjuna hjá VÍF

Mynd: Álvur Haraldsen

### Stjørnan-VÍF 29-22 (14-10):

# Stjørnan var ov stórur biti

**Royndirnar, rástyrkin og sentimetrarnir vóru á muni, tá Stjørnan við greiðum sigri móti VÍF vann sítt sætta steyapheiti upp á sjey ár**



jakup@sosialurin.fo

Jákup Mørk

Hóast talan gjørdist um væntaða favroitt-sigurin, har spenningrn varð tikin úr dystinumi løtunum kring steðgin, so spældu Stjørnan og VÍF eina hampuliga undirhaldandi kvinnufinalu leygardagin.

Fleiri ferðir upp í saman varð sagt, at VÍF mest av øllum skuldi taka dystin sum eina uppliving, har tær bara skuldu út at gera sítt besta, og langan part av fyrra hálvleiki var hetta eisini nóg mikið til at halda liðnum væl og virðiliga inni í dystinum.

Stjørnan tóktist at hava trupulleikar við veruliga at fáa ferð á sítt spæl, og tað var einamest skotstyrkin hjá Simonu Petersen, sum helt tær framman fyri VÍF.

Hjá VÍF var stóri skjúttin sum ikki einaferð Liljan Djurhuus. Ikki minst gjørdi hon nógv um seg fyrstu løtuna av dystinum, áðrenn hon fekk viðspælararnir við sær. Men hóttanin hjá VÍF kom kanska ov einvíst frá henni.



Ikki er vist, at lítli alvin fekk alt við. Men í øllum førum var Morten Huust Pedersen ein glaður pápi og venjari

Mynd: Álvur Haraldsen

Í øllum førum broytti tað dystin fullkomuliga, tá Annika Ljósstein varð sett á høgra bakk at verja fyri Liljuni. Tí uppgávuna hevði Valentina Siciu havt fyrstu løtuna, men tá Annika kom inn, vórðu tacklingarnar á skjúttan bæði skjótari og harðari.

Tað eydnaðist tó ikki hjá Stjørnuni at renna undan VÍF, sum støðugt royndi at spæla sítt spæl. Fleiri ferðir eydnaðist at spæla Stjørnu-verjuna tunna, og góða lagið á gulu áskoðarunum bendi á, at ein sensatión kanska kundi vera í væntu.

### Avgerandi rástyrki

Sensatiónin varð tó av ongum. Fyrst og fremst, tí Stjørnan kropsliga hevur ein tann sterkasta hópin í landinum.

Munurin í sentimetrum gjørdi, at VÍF skuldi stríðst nógv meira í hvørjum einasta nærdysti, og seinastu